

# Familjuferðir

Av og á skal familjan lyfta seg upp um strongda gerandisdagin, taka sær av løttum og bara hugna sær saman í barnavinarligum umhvørvi. Tú fært nøkur minni fyri lívið, familjan fær nøkur felags upplivilsi, og restin av árinum glíður nógv betur.

Familjuferðir eru serlig tilboð, sum Atlantic Airways bjóðar føroyskum barnafamiljum. Far til Danland ella LaLandia í eina ella tvær vikur. Tit búgva beint við havið og eina góða strond, og regnar tað, kunnu tit altíð halda frí innandura í baðilandinum.

**Les meira á atlantic.fo**

**Gev gætur!**
Keypir tú Familjuferðir, mást tú eisini tekna eina avlýsingartrygging, sum er 5% av kostnaðinum.





Familjuferð - Danland

## Danland Ebeltoft í eina viku

2 vaksin og 2 børn

**10.374,-**

Børn undir 16 ár.
Íroknað er Danland, flogferð og ferðaavgjald.
Galdandi: 15/5-12/6 og 14/8-28/8

**Onnur prísdømi:**

| | Fyri hvønn í 1 viku |
|---|---|
| Danland Blåvand: 8 fólk | Prísur úr **2.789,-** |
| Danland Søndervig: 6 fólk | Prísur úr **2.788,-** |
| LaLandia: 4 fólk | Prísur úr **3.490,-** |
| LaLandia: 6 fólk | Prísur úr **3.161,-** |
| LaLandia: 8 fólk | Prísur úr **3.128,-** |

Børn undir 16 ár fáa avsláttur.
Íroknað Danland/Lalandia, flogferð og ferðaavgjald.



## Konsert-ferðir

**Eric Clapton**, **Rolling Stones**, **Pavarotti** og **McCartney** eru stór nøvn, sum neyvan koma til Føroya í bræði. Men til ber kortini at uppliva heimsstjørnur, um tú fert á konsertferð við Atlantic Airways.

Vit skipa javnan fyri konsertferðum serliga til Danmarkar og London til stór nøvn, ið tú annars bert upplivir gjøgnum hátalaran. Vit gera eisini serligar ferðir til **Roskilde Festivalina** í Danmark.

**Les meira á atlantic.fo**

## Fótbólts-ferðir

Tann tíðin er farin, tá ið mætar fótbóltstjóðir undirmettu pinkutjóðina í Útnorði, og tað er ikki minst trúgvu áskoðarunum fyri at takka. Vilt tú fylgja og stuðla okkara fótbóltslandsliði, flýgur tú við Atlantic Airways.

Vit fyrireika fótbóltsferðir fyri føroyska áskoðaran, sum kann síggja fram til at vitja **Sveits**, **Írland** og **Frakland** í næstum.

Tú sleppur at síggja okkara hetjur stríðast á vølli ímóti heimsstjørnum, og so upplivir tú býir í góðum ferðalagi og fyrikomandi fólk, tú neyvan hevði hitt annars.

**Les meira á atlantic.fo**



## Royn okkurt annað

Vit eru vanabundin og velja ofta tað, ið eydnaðist væl, einaferð enn. Men hví ikki royna aðrar leiðir, tá ið tú kortini fert avstað. Hvat við at fara tvørtur um Atlantshavið til New York og merkja pulsin í Manhattan.

Við Atlantic Airways nýtist tað ikki at kosta tað stóra. Í samstarvi við Iceland Air kunnu vit bjóða ferðir til USA umvegis Ìsland fyri 5.400 krónur (uttan ferðaavgjald) í háárstíð og einans 3.900 krónur (uttan ferðaavgjald) í lááarstíð.

Vit skipa eisini javnan fyri øðrum ferðum, ið víkja frá okkara vanliga útboði. Eitt nú skipa vit fyri ferðum til Skotlands, har tú kanst læra enskt á málskeiðum og búgva privat hjá familju ella í egnum bústaði.

**Les meira á atlantic.fo**

Fyrivarni verður tikið fyri, at villur kunnu vera í tekstinum og at broytingar kunnu verða framdar. Atlantic Airways kannar sær rætt at broyta prísir og flogtíðir. Fyrivarni verður eisini tikið fyri, at gjaldsoyravirði kunnu verða broytt. Útkast og samskipan: Sansir, tel 355 355




# ín saðil og eg



*Tað er líkasum, at við hesum trýkvarta metrinum, sum hesturin lyftur teg uppfrá, verður sýnið eitt heilt annað, og tá hesturin kortini er tann, sum ansar eftir, hvar stigið verður, kunnu eyguni frítt leita yvir stórslignu náttúruna*

kortini fingin aftur, og tó at hon tivaði nakað, tá hon loksins hevði vunnið niðan aftur til okkara, so mótmælti hon ikki tað minsta, nú eg syrgdi fyri at hava nakað nógv betri tak á henni í steðgunum. Hóast túrurin er góður, so havi eg altso ætlanir um at gjøgnumføra hann á hestbaki, og ikki á egnu apostlunum!

## Órørdar náttúruperlur

Úr Grótbrotinum gekk leiðin so framvið Skælingsfjalli, áðrenn kósin varð sett oman í Leynarhagan. Ein av veruligu náttúruperlum okkara, sum tíverri – ella kanska tíbetur – alt ov fá ferðafólk finna leiðina fram til. Í øllum førum ikki, um ferðin gongur í bili. Tað skerst heldur ikki burtur, at tað nú kennist sum stórt spell, at lyftini um eina gøtu, tá Oyggjarvegurin varð gjørdur, ikki vórðu hildin. Gamaní ber til partar av ferðini at ferðast eftir gamla vegnum, men talan er ikki um gøtuna, sum tá var í umbúna, og bæði reið- og gongufólk vildu ivaleyst ynskt, at givnu lyftini tá vórðu hildin.

Nú undanbrekkan er somikið brøtt, hava hestarnir annars fingið eina lítla hvíld, skilt soleiðis, at tað nú eru vit, sum ganga fremst, leiðandi við hvør sínum hesti. Og hóast tað onkra staðni kann vera eitt sindur knortlut at ganga, so kennist tað gott, soleiðis at sleppa at røra seg eina løtu. Eisini soleiðis at afturparturin – sum nú kortini ikki er so eymur – fær frið eina løtu.

Komin móti Leynum er aftur ein biti á skránni. Hesaferð eru tað grindin, spikið og fiskurin, sum saman við teimum køldu eplunum koma fram, og tó at regnið nú er farið at gera um seg, so fær hetta ikki gjørt nakað við góða huglagið. Boðini undan fráferðini vóru kortini, at vit skuldu vera væl ílatin, og við longum ullintum undirbuksum, saman við tí myrkamorreyðu skal meira til enn okkurt hissini æl til, áðrenn skarvurin verður givin yvir. Og ikki minst gerst støðan bara alt meira hugalig, nú verulig framstig síggjast á ferðini. Vegurin aftur til Havnar er nú í øllum førum longri, enn hann er til Vestmanna, so tað vendist ikki.

## Skjótari og skjótari

Jú, skjótt er nú at fara um bygdina á Leynum. Stykkið er beint fyri framman, og higani halda vit víðari niðan brekkuna móti Ognarhaganum í Kvívík. Tað kennist nakað hart, nú vit eina góða løtu ríða á asfalteraðum lendi, men tað er tó skjótt, at tað aftur fer at grønkast.

Tað er nakað bratt at koma niðan Ognarhagan, so nú er aftur at fara av hestbakinum. Tað er tó ikki verri enn so, at vit ganga halagongu allan vegin niðan. Tað vil siga, at hildið verður í rossinum fyri framman, og soleiðis verður tú at kalla togaðu niðan, uttan at mótbrekkan kennist alt ov møtumikil.

Komin niðan á varðan á sýnini er gott og slætt at ríða norður á Bornsvarða á Gotursháls, har gøtan úr Kvívík og gøtan úr Kollafirði umskarast. Við varðan verður hvílt fyri seinastu ferð, áðrenn tað nú aftur verður undanbrekka. Aftur her mugu hestarnir leiðast, og onkur tekur skemtandi til, at tað næsta væl verður, at hesturin skal á bakið hjá okkum, men so galið verður tað nú ikki. Brekkan oman í Heygadal er skjótt gingin, hóast nógvir blotar eru á leiðini oman í Heljareyga, ella kennist tað nú bara soleiðis, og so er bara seinasta pettið eftir.

Ferðin er eisini sett nakað væl upp, nú vit hálvgum mugu roknast sum royndir reiðmenn, og tað gongur við fullari ferð framvið byrgingini oman móti bygdini. Ræsta kjøtið hjá Bjørg og Agga bíðar fyri framman, men hóast hetta, so er tað ikki við sørt av sorgblídni, at eg loksins loysi saðilin av Stelpu. Vit bæði hava havt ein framúr góðan dag, og hjá einum skrivstovumanni er tað ikki víst, at tað verður so skjótt, at farið verður aftur. Men tó – upplivingin hendan dagin hevur í øllum førum givið mót upp á meira, og afturparturin var nú ikki so eymur hóast alt. Kanska er tað meira ryggurin, sum er farin at geva seg, og tað er ikki frítt við andsperru næstu dagarnar. Men hvat. Eymleikin og pínan av hesum verður í øllum førum væl og virðiliga uppvigað av ferðini, sum av sonnum má sigast at vera eitt minni fyri lívið.



*Omanfyri Leynar var døgurðasteðgur. Sjálvt um regnið nú ger um seg, so er hetta tó ikki nakað, sum nervar soleiðis stórvegis*



*Tað lættir munandi um tungu mótbrekkurnar, at hesar verða tiknar í halagongu*



*Nú Vestmanna av álvara er farið at nærkast, gongur seinasta pettið av ferðini við fullari ferð*